# Musikkskúlin, ið eingin varðar av!!

ÓLAVUR OLSEN



Fyrst nakrir spurningar. Ber tað til at spæla fótbólt á tennisvølli? Ber til at spæla kurvabólt á rennibreyt? Ber til at reka matstovu í fjósi? Ber til at hava fólkaskúlaundirvísing í býbussi? Ber til at hava fimleikaundirvísing í neysti?

Sjálvandi ber hetta ikki til. Á sama hátt ber ikki til at hava tónleikafrálæru á nøktandi støði í kustaskápi, í fimleikahøll, goymslu fullari av óruddi ella í skúlastovum uttan nøktandi amboð til undirvísingina.

Trúgv mær, hetta eru teir karmar og tann veruleiki, ið næmingar í tónleiki og tónlistalærarar teirra liva undir. Stórur partur av dagligu tónleika undirvísing, ið land og kommunur í felag skulu eitast at reka, fyrigongur í dag undir hesum og líknandi treytum.

Hetta er, eftir mínum tykki, ein sera stórur trupulleiki. Somikið stórur, at hann beinleiðis oyðileggur og niðurbrýtur musikkundirvísingina, hugin hjá læraranum at undirvísa á støðunum og harvið eisini hugin hjá næmingunum at fáa frálæru. Orðatakið "ein óndur sirkul" rennur mær í hug.

Í síðsta enda vendur hetta aftur í neiligari umtalu av musikkskúlaundirvísingini, og tað er á ongan hátt ynskiligt.

Í løtuni eru musikkskúlar í flest øllum kommunum í landinum. Tórshavnar Musikkskúli er tó einasti musikkskúli í landinum, ið undirritaðið hevur verið á, har umstøður til tónleikaundirvísing eru nøktandi. Veit um eitt ella tvey støð, ið eru farin undir at betra um umstøðurnar. Aðrastaðnis eru tær frá ikki nøktandi til als ikki nøktandi og út av lagi vánaligar.

Eg gevi tónleikafrálæru á Tórshavnar Musikkskúla og Norðljómi, ið er tónlistaskúlin á Oyrabakka og Eiði. Eg skal erliga viðganga, at um eg fekk møguleikan, vildi eg flutt alla undirvísing til havnina. Hóast fyrrverandi og núverandi økisleiðari fyri Norðljóm av øllum alvi hava gjørt sítt fyri at betra um viðurskiftini og sjálvt um hissini stig eru tikin til tíðir, so eru hølisumstøðurnar støðugt versnaðar síðstu árini, og eru tær í dag sera vánaligar. Tað er ikki ov nógv sagt, at undirvísingin og harvið Norðljómur sum tónlistarskúli er við at detta frá hvørjum øðrum. Trupulleikin er væntandi framskygni og planlegging frá kommununi. Hvat ætla kommuna og land við skúlanum. Hvørjar kommunalar uppgávur hevur hann og hvussu skal hann megna hesar á bestan hátt.

Í mínum hugaheimi er hetta rættuliga einfalt. Um kommunur ynskja at bjóða tónleikafrálæru til børn og ungdómin, so mugu og skulu tær eisini lataö nøktandi høli og umstøður. Um tær ikki vilja hetta, so er tað sjálvandi í lagi, men so skulu tær siga frá á røttum stað´, soleiðis at orkan kann brúkast betur aðrastaðnis. Tað ber ikki til at hava tónlistaskúla uttan "fysiskar" karmar. Tað ræður um at skapað eitt umhvørvi, har ungdómur samlast at vera saman um tónleik og samanspæl. Innan ítróttin er hetta ein sjálvfylgja, eisini í sundalagnum, so hví er tað ikki ein sjálvfylgja innan tónleikafrálæru?

Eg havi tosað við fleiri tónleikalærarar, ið arbeiða runt um í landinum. Flest allir eru á einum máli um, at hølisviðurskiftini eru ótolandi og høvdu teir, um tað var møguligt og um teir fingið møguleikan, fari aðrastaðnis at undirvíst.

At bjóða tónleikafrálæru uttan at hava karmarnar er, eftir mínum tykki, at halda bæði næmingar og lærarar fyri gjøldur og tað er eisini, aftur eftir mínum tykki, at halda skattgjaldaran fyri gjøldur at lataö verandi støðu halda áfram. Hesin peningur hevði í fleiri førum verið betur spardur!!

Eg vil tí hervið innarliga heita á kommunur og land um at gera sær greitt hvat tey vilja við tónlistaundirvísingini og síðani takað avleiðingarnar av hesari niðurstøðu.

# Aftursvar til Arna Winthereig: Hvussu skilja vit veljarakanningina

BJARNI H. NICLASEN
vegna Unga Tjóðveldið

Í lesarabrævi frá Arna Winthereig, sum var eitt aftursvar til Unga Tjóðveldið, stendur, at grundin til, at Sambandsflokkurin vinnur fleiri atkvøður frá Javnaðarflokkinum enn Tjóðveldi, er, at Sambandsflokkurin er tann einasti sum arbeiðir 100% fyri ríkisfelagsskapinum. Hetta ger so, at Sambandsflokkurin er tann einasti flokkurin, sum kann geva tann tryggleikan, sum hinir flokkarnir ikki kunnu geva.

Tað at arbeiða 100% fyri ríkisfelagsskapinum tykist sum nakað, sum er ringt at definera. Har er so siga eingin sambandsmaður, ella í hvussu er eingin, sum vit vita um, sum arbeiðir fyri at strika tey stigini, sum longu eru tikin á fullveldisleiðini. Her undir kann nevnast: flaggið, málið og málsøki, sum eru yvirtikin av undanfarnum samgongum. Sostatt vil Sambandsflokkurin ikki virka fyri at fáa okkum nærri at Danmark, men heldur bert varðveita tað slagið av sambandi, vit hava við Danmark nú.

Hetta er eitt slag av konservatismu, har núverandi støða skal varðveitast uttan mun til, hvussu góð ella ring hon er fyri okkara demokratisku og búskaparligu støðu. Størri gagn hevði verið í einum øðrum slagi av sambandi. Eitt samband út í heim við londini kring okkum og við útheimin sum heild. Men so leingi vit eru partur av ríkisfelagsskapinum, sum í veruleikanum bert er eitt annað orð fyri Danmark, so ber ikki til hjá okkum at gera millumlandasáttmálar innan øll øki. Heldur ikki ber til hjá okkara ítróttarfólki at taka lut í altjóða ítróttartiltøkum, so sum Olympisku Leikunum, uttan at hetta er undir donskum flaggi, og vit hava ongan sess á aðalfundi í ST. Sjálvandi skulu vit varðveita samstarvið við Danmark, men vit vilja samstundis eisini fáa samband við aðrar tjóðir, og hetta kann bert náast til fulnar við at taka loysing. So fyri at økja um samstarvið út í heim noyðast vit at bróta hesa tryggleikakonservatismu og royna at uppnáa nakað betri, nevniliga fullveldi.

Í seinnu helvt av lesarabrævinum verður nevnt, at búskaparligi tryggleikin er størri, um vit verða verandi partur av Danmark. Hetta passar bert lutvíst, tí tað vísir seg, at ein kunstig innsprænging av kapitali í einoghvønn búskap hevur ongar langtíðar fyrimunir og kann vera til ampa fyri vøkstur. Unga Tjóðveldið er samt í, at vit skulu hava búskaparligan tryggleika í Føroyum, men hesin tryggleikin skal koma frá teimum virðunum, sum vit skapa her í landinum, og ikki frá einari kunstigari innsprænging av kapitali úr Danmark.

# Frítíðarskúlin – hvar er hann á veg?

Seinasta árið hevur hesin spurningur fylt meiri og meiri í okkara hugaheimi. Verður gongdin tann, ið sett er út í korti av landsins myndugleikum, framhaldandi, so verður alt arbeiðið, sum er bygt upp gjøgnum tey 13 árini, frítíðarskúlin hevur verið til í Føroyum, brotið niður. Tað verður ein goymsla til børnini, til tey verða heintað, ella kunnu fara heim.

Skúlin hevur fingið fleiri tímar til hesi børn, sum eru tiknir frá frítíðarskúlunum, tímarnir pr barn, sum í løtuni er 3,0, skal niður á 2,42 eftir nýggjár, hetta ger, at starvsfólk í mesta lagi KUNNU fáa 25 tímars arbeiðsviku, sum aftur hevur við sær, at pedagogar rýma, tí teir kunnu ikki klára dagligar útreiðslur við undir trýkvartari løn.

Vantrivni og frustratión valdar millum starvsfólkini, sum sjálvandi hevur árin á dagligdagin, bæði á arbeiðsplássinum og heima.

Í mai mánaði vóru vit 9 námsfrøðingar í Hoyvík, nú eru vit 4½! 50% niðurgongd! Fólk fara aðra staðir eisini.

Sostatt verður hetta ikki eitt pedagogiskt tilboð meir!

Kundu hugsað okkum at fingið eitt kjak í gongd um hesi viðurskifti!

· Hvat er ætlanin við frítíðarskúlanum?
· Hvar er hann á veg?
· Hvat við børnum við serligum tørvi?
· Hvat við kvalitetinum?
· Hvat við frítíðini hjá børnunum?

**Hvat hugsa:**
- Landsmynduleikar?
- Kommuna?
- Pedagogfelagið?
- Starvsfólk?
- Foreldur?
- Onnur?

Skal frítíðarskúlunum verða lív lagað sum eitt pedagogiskt tilboð til børnini, má okkurt gerast.

*Vegna starvsfólk í frítíðarskúlanum í Hoyvík*
Levi Mørk og Charlotta á Váli Olsen, námsfrøðingar

# Mediastuntið hjá John Johannesen

EGIN MARKNÁ

Skilji væl John - at hann ger, hvat hann kann fyri at fáa veljaran at gloyma ruðuleikan í Javnaðarflokkinum.

Flestu føroyingar munnu verða samdir um, at tað er alt ov dýrt at ferðast til og frá Føroyum.

Men, at ein almennur miðul (við public service skyldum – hvat tað so er?), sum KvF. stillar upp og letur seg brúka sum marknaðarførings amboð hjá einum einstakum politikkara ella flokki, er undir alt lágmark.

Um tíðindamaðurin á degi og viku, ið gjørdi samrøðuna við John, var seriøsur, kundi hann sett viðkomandi spurningar sum t.d. :

Um tú veruliga meinar nakað við hesum, hví kemur tú so nústani við uppskotinum?

Hevur tað ikki kostað ov nógv at ferðast í fleiri ár?

Atkvøddi tú og javnaðarflokkurin ikki fyri einskiljingini av Atlantsflogi?

Leggur tað ikki trýst á ferðaseðlaprísin uppeftir, tá man einskilir eitt felag, ið onga kapping hevur?

Vit nærkast milliardini í halli á fíggjarlógini!

Hvør skal gjalda fyri ferðaseðla lækkingina?

Skal tað aftur klípast av hjá pensionistum og teimum veikastu í samfelagnum? Skal pensiónsaldurin kanska hækka enn meira?

Hvat skal gerast fyri at fáa fíggjarlógina at javnviga? og eg kundi hildið á,

men tað skal eg ikki gera.

John er ikki tann fyrsti, sum hevur klárað at lokka miðlarnar apríl, og hann verður neyvan tann síðsti.

Minnist, hvussu snildisliga Anfinn Kallsberg bar seg at við bummgjaldinum, tá teir ofraðu Jógvan við Keldu, sum landsstýrismann. Jógvan bleiv gloymdur, og tíðindafólkini kýkaðu agnið hjá Anfinni, at nú skuldi tað verða frítt at koyra í undirsjóðartunnlunum.

Sig so tað - the show must go on.

Lesið Sosialin - so eru tit við